

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 11 - 2012

# Boringin av Brugdan II brunni fyribils steðgað

Statoil og samstarvsfeløgini ExxonMobil og Atlantic Petroleum hava avgjørt at steðga fyribils við boringini av Brugdan II brunninum á føroyska landgrunninum boða tey frá í tíðindaskrivi í morgun. Brugdan II brunnurin er boraður til løgini undir basaltinum, men rokkið er ikki á mál enn. Nú komið er út á veturin, kann roknast við munandi verri veðri, og tí er avgerð tikin um at gevast við boringini fyribils. Føroysku myndugleikarnir hava játtað eini útsetan inntil ársenda 2013. Brunnurin er umleið 40 fjórðingar úr landi og varð borurin settur í tann 17. juni 2012. Flotpallurin COSL Pioneer er brúktur til boringina, sum er farin fram á 450 m havdýpi. Brugdan II brunnurin er annar leitibrunnurin, ið boraður er á loyvi 006. Leitiloyvið umfatar eitt øki, sum er umleið 579 ferkilometrar. Statoil hevur verið í Føroyum síðan ár 2000, og er í dag fyristøðufelag á 6 loyvum í føroyskum øki. Loyvini eru øll sokallaði sub-basalt loyvi, men jarðfrøðiliga eru tey ymisk. Yvirskipaðu leitiætlaninar hjá Statoil eru at vera tíðliga inni á nýggjum leitiøkjum og miðja eftir eini leiðandi støðu. Støðan hjá Statoil í Føroyum er liður í hesum ætlanum. Statoil eigur 50% í Brugdan loyvinum. Samstarvsfeløgini eru ExxonMobil Exploration and Production Faroe Islands Ltd við 49% og Atlantic Petroleum P/F við 1%. Brugdan II brunnurin er áttandi leitibrunnurin boraður á føroyska landgrunninum síðani 2001.